KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

**28/18**
**15/00896 Uppraðfesting av mentanardeplum í Klaksvík –** ***eykajáttan, fyrra viðgerð***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 13.03.2018 | 10/18 | |
| 2 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 13.03.2018 | 6/18 | |
| 3 Fíggjarnevndin | 21.03.2018 | 15/18 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð* | 22.03.2018 | 28/18 | |
| 5 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð* | 26.04.2018 | | |

**Frágreiðing um málið:**
Tað eru nú fleiri ár síðan, at Jógvan Andrias Joensen tók stig til at skipa fyri mentanarligum framførslum og øðrum mentanartilboðum og upplivingum til borgarar og vitjandi í søguliga umhvørvinum í gamla handilsbygninginum úti í Klaksvík.

Í dag kunnu vit staðfesta, at tað er eydnast honum at gera Spaniastovu, sum er miðdepilin fyri hesum mentanarliga virksemi, kenda kring alt landið. Vit kunnu siga, at Spaniastova hevur sett Klaksvík á mentanarliga Føroyakortið.

Hetta hevur ført til, at Spaniastova hesi seinastu árini av og á hevur verið umrøtt millum býráðspolitikarar, har breið semja tykist vera um, at her er talan um eitt unikt (eindømis) tiltak, sum er almannagagnligt og ríkar okkara lokalsamfelag við mentanarligum tilboðum.

Við støði í hesum hevur meirilutin í býráðnum seinastu árini ført fram, at hetta virksemið hevur uppiborið at verða raðfest politiskt, eitt nú við einum avrikssáttmála millum býráðið og Spaniastovu, sum ger tað møguligt hjá fyriskiparanum at leggja enn meira orku í hetta arbeiði, samstundis sum tað vil tryggja eitt enn størri og støðugari tal av tiltøkum í og út frá Spaniastovu.

Eitt endamál og vinningur við hesi uppraðfesting er, at lokalsamfelagið verður ríkað og fær gagn av enn fleiri mentanarligum tilboðum og upplivingum, sum um nøkur ár fer at fáa munandi betri karmar í komandi Mentanarhúsinum í Klaksvík (Posthúsinum). Sostatt er hetta ein náttúrlig menning av kommununi innan upplivingarbúskap, sum er eitt av innsatsøkjum býráðsins sambært samtyktu vakstrarætlanini frá 2011.

*Avrikssáttmáli verður gjørdur við Spaniastovu v/Jógvan Andriasi Joensen*

Vísandi til omanfyri standandi innleiðing um Spaniastovu, hevur tað í nøkur ár verið frammi í politisku skipanini at raðfesta virksemið í Spaniastovu við einum avrikssáttmála. Við støði í hesum hava borgarstjórin og Signhild Vilhelmsdóttir Johannesen, virkandi trivnaðarnevndarforkvinna, samskift við Jógvan Andrias Joensen um møguliga at gera eina slíka umskipan og uppraðfesting av Spaniastovu, sum leggur virksemið har í eina fasta legu og tryggar karmar.

*Framhald á næstu síðu...*

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

*...framhald frá síðstu síðu.*

Endamálið við hesum er at geva Jógvani Andriasi, sum skapara og stigtakara til hetta '*unikka*' borgaratilboð, umstøður til at brúka fulla orku uppá at víðarimenna tær mentanarligu og fólksligu upplivingarnar, sum bæði Spaniastova og umhvørvið annars úti í Klaksvík kann verða karmur um.

Samskift hevur verið við fleiri ymsar partar um hetta. Eisini hevur nevndin fyri Norðoya Fornminnissavn umrøtt málið á nevndarfundi, og vísir tað seg, at bæði núverandi leiðari, Andras Sólstein, og nevndin fyri Norðoya Fornminnasavn eru fegin um tað virksemi, sum Jógvan Andrias hevur bygt upp í Spaniastovu.

Andras Sólstein, leiðari fyri Norðoya Fornminnissavn, hevur boðað frá, at hann hevur gott samstarv við Jógvan Andrias. Víðari heldur hann, at Spaniastova hevur stóran týdning fyri fornminnissavnið, tí tað viðvirkar til at lata tað upp fyri almenninginum og at seta hetta søguliga umhvørvið kring Klaksvíksgarðin á føroyakortið mentanarliga.

Upp á fyrispurning frá umsitingini staðfestir nevndin fyri Norðoya Fornminnissavn:

- at Spaniastova er eitt aktiv fyri mentanarlívið í Klaksvík og skapar lív á savninum
- at samstarvið við Jógvan Andrias er fyrimyndarligt – eingin ósemja hevur verið
- at allar fíggjarligar støður við Jógvan Andrias hava verið avgreiddar uttan trupulleikar

Nevnd og savnsleiðari eru sostatt opin fyri framhaldandi samstarvi við Jógvan Andrias Joensen um Spaniastovu.

Somuleiðis er Jógvan Andrias sjálvur áhugaður í eini umskipan, sum inniber, at hann fer úr starvi hjá Klaksvíkar kommunu og burturav fer at starvast við Spaniastovu við tí fyri eyga at víðarimenna og skapa enn fleiri mentanarupplivingar til borgarar og vitjandi.

Við støði í hesum hevur umsitingin – í samráð við politisku leiðsluna – kannað møguleikarnar og gjørt eitt uppskot til avrikssáttmála við Spaniastovu v/Jógvan Andrias Joensen, galdandi frá 1. apríl 2018.

Umframt henda avrikssáttmála er avtalað við Jógvan Andrias Joensen, at kommunan skal viðvirka til at tryggja Spaniastovu tryggar leigukarmar.

Somuleiðis eru báðir partar samdir um í felag at virka fyri at dagføra hølisumstøðurnar í og kring Spaniastovu við atliti til eitt nú hesi viðurskifti: *útvegan av arbeiðshøli/skrivstovu, *flyting av trappu úr Spaniastovu í eitt uttari høli, *backstage, *betran av hitaviðurskiftum, *betran av atkomu og *í samráð við eigaran at útvega betur hóskandi staðseting til grillbúðina sunnan fyri Handilsbygningin úti í Klaksvík.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Sambært lønardeild kommununnar eru tær samlaðu, árligu lønarútreiðslurnar í sambandi við Jógvan Andrias við øllum tilhoyrandi gjøldum: 440.000 kr. ella 36.667 kr. um mánaðin.

*Framhald á næstu síðu...*

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

*...framhald frá síðstu síðu.*

Í sambandi við møguliga fráferð úr starvi hevur Jógvan Andrias Joensen higartil uppspart sær eina uppsagnartíð á fimm mánaðir, umframt uppsparda feriu.

Avtalað er við Jógvan Andrias, at hann fær løn í tveir mánaðir í sambandi við hesa ætlaðu fráferð úr kommunala starvinum, sum fær gildi pr. 1. apríl 2018. Sostatt verður talan um løn í tveir mánaðir (apríl og mai) + umleið 6 vikur í uppspardari summarferiu. Henda útreiðsla verður borin av játtanini til Húsið.

Lagt verður upp til, at árliga gjald kommununnar sambært avrikssáttmálan við Spaniastovu verður 530.000 kr., ella 44.167 kr. um mánaðin forút.

Omanfyrinevnda árliga upphædd er sett saman av hesum upphæddum:
Grunduppphædd í avrikssáttmálanum . . . . . 450.000 kr.
Mettar útreiðslur fyri leigu v.m. . . . . . . 50.000 kr.
Mettar útreiðslur fyri tiltøk v.m. (verandi avseting) . . . . 30.000 kr.

Samanlagt: 530.000 kr.

**Fyrsta gjaldið fellur 1. apríl 2018, so talan verður um tríggjar ársfjórðingar (níggju mánaðir) í hesum fyrsta fíggjarárinum, har samlaðu útreiðslurnar av avrikssáttmálanum fyri 2018 sostatt verða 9 mánaðir x 44.167 kr. = 397.500 Kr.**

Miðað verður ímóti, at Spaniastova tey eftirfylgjandi árini fær eina árliga játtan á 530.000kKr. Tó verður støddin av árliga gjaldinum at eftirmeta og áseta fyri eftirfylgjandi árið á einum árligum fundi millum partarnar í oktober mánað, fyrstu ferð í oktober 2018. Sí nærri ásetingar hesum viðvíkjandi í viðlagda uppskoti til avrikssáttmála.

Sum tað framgongur av niðanfyri standandi skermmynd av Weblundanum, so er avsetingin í samtyktu fíggjarætlan býráðsins fyri árið 2018 til rakstrarstað nr. 05241470038 *"Stuðul til mentan"* samanlagt 2.417.000 kr.

| | | |
|---|---|---|
| 05241470038 | Stuðul til mentan | 2.417.000 |
| 111000 | Løn, mánaðarlønt | 80.000 |
| 142000 | Umboðan | 0 |
| 146980 | Keyp av vørum annars | 0 |
| 147905 | Lýsingar Tæn.keyp | 10.000 |
| 154000 | Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 0 |
| 524000 | Tilskot til einstaklingar undir sosialum skipanum | 0 |
| 524500 | Tilskot til einstaklingar - útbúgving, granskíng o.a. | 30.000 |
| 542000 | Vanligur rakstrarstuðul til stovnar | 1.805.000 |
| 549000 | Annar stuðul o.a. | 190.000 |
| 549040 | Stuðul til áhugafeløg (Ítrótt v.m) | 146.000 |
| 549060 | Stuðul smærri útgj. | 156.000 |
| 751100 | Keyps-mvg | 0 |
| 759800 | Endurrindan av keyps-mvg kommunur | 0 |

*Framhald á næstu síðu...*

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

*...framhald frá síðstu síðu.*

Av niðanfyri standandi útgreining hjá Mentanardeildini av hesum sama rakstrarstaði framgongur, at partur av nevndu, samlaðu avseting eru 30.000 kr., sum eru settar av til tiltøk hjá "Leikar í Lund" – sí mynd:

**Stuðul Mentan**

| Stuðul mentan, 0541470038 Felag | 2018 | | Løn Konta 111000 | Keyp vørur Konta 146980 | Lýsingar Konta 147905 | v.m. Konta 154000 | sosial skip Konta 524000 | útbúgv/gransk Konta 524500 | stuð > 50% Konta 542000 | stuðul Konta 549000 | áhugafel Konta 549040 | smærri útgj. Konta 549060 | Konta Samanlagt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Kl Sjónleikarafelag | 50.000 | 549040 | | | | | | | | | 50.000 | | 50.000 |
| AA - Húsatuðul | 6.000 | 549040 | | | | | | | | | 6.000 | | 6.000 |
| Kl Hornorkestur | 50.000 | 549040 | | | | | | | | | 50.000 | | 50.000 |
| Miðstovan | 50.000 | 542000 | | | | | | | 50.000 | | | | 50.000 |
| Norð Fornminnisavn | 425.000 | 542000 | | | | | | | 425.000 | | | | 425.000 |
| Atlantis | - | | | | | | | | | | | | - |
| Dragin | 50.000 | 542000 | | | | | | | 50.000 | | | | 50.000 |
| Leikar í Lund | 30.000 | 542000 | | | | | | | 30.000 | | | | 30.000 |
| Gr Mentanarhús | 450.000 | 542000 | | | | | | | 450.000 | | | | 450.000 |
| Keyp Listarverk | - | | | | | | | | | | | | - |
| Aðrir studningar | 156.000 | 549060 | | | | | | | | | | 156.000 | 156.000 |
| Grunnur mentanartiltøk | 200.000 | | | | 10.000 | | | | | 190.000 | | | 200.000 |
| Stuðul Lestrarkort | 30.000 | 524500 | | | | | | 30.000 | | | | | 30.000 |
| Kunningarstovan | 500.000 | 542000 | | | | | | | 500.000 | | | | 500.000 |
| Róðraneyst Árnafj | 40.000 | 549040 | | | | | | | | | 40.000 | | 40.000 |
| Søguskriving | 80.000 | 111000 | 80.000 | | | | | | 0 | | | | 80.000 |
| Grunnur spinnarí | 300.000 | 542000 | | | | | | | 300.000 | | | | 300.000 |
| FMA | - | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | - |
| Tilsaman | 2.417.000 | | 80.000 | 0 | 10.000 | 0 | 0 | 30.000 | 1.805.000 | 190.000 | 146.000 | 156.000 | 2.417.000 |

Mælt verður til, at nevnda upphædd á 30.000 kr. til Leikar í Lund verður partur av fíggingini av hesum avrikssáttmála við Spaniastovu og harvið minkar árliga meirkostnaðin av hesum við 30.000 kr.

**Neyðuga eykajáttanin til hetta tiltak í inniverandi ári (2018) verður sostatt:**

| | |
|---|---|
| Meirkostnaður av avrikssáttmálanum í 2018: (9 mánaðir x 44.167 Kr) | 397.500 kr. |
| Verandi avseting til "Leikar í Lund" (542000) – partur av 05241470038 | -30.000 kr. |
| **Tvs. tørvandi eykajáttan 2018:** | **367.500 kr.** |

**Til at fíggja hesa nýggju rakstrarútreiðslu verður mælt til, at býráðið samtykkir nevndu upphædd á 367.500 kr. sum eina eykajáttan í 2018 til til rakstrarstað nr. 05241470038 "Stuðul til mentan".**

*Arbeiðsbólkur gera tilmæli um framtíðar skipan og samskipan av virkseminum út í Klaksvík*

Samstundis sum Spaniastova við hesum verður uppraðfest, er avtalað við Jógvan Andrias og savnsleiðsluna, at arbeiðast skal víðari við at finna tann besta framtíðar bygnaðin fyri Norðoya Fornminnissavn og Spaniastovu v.m.

Tí verður samstundis mælt til, at ein arbeiðsbólkur verður settur at kanna allar møguleikar og fortreytir fyri skipan av tí samlaða virkseminum í bæði Norðoya Fornminnissavni og Spaniastovu sum partur av savninum og at koma við einum uppskoti um skipan.

*Framhald á næstu síðu...*

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

*...framhald frá síðstu síðu.*

Um so verður, at hetta tilmæli verður samtykt, verður mælt til, at Mentanardeildin ger eitt uppfylgjandi tilmæli í samráð við Norðoya Fornminnissavn og Spaniastovu, sum verður at leggja fyri eitt av fyrst komandi fundarumførunum um arbeiðssetning og manning av nevnda arbeiðsbólki.

**Lógargrundarlag:**
Spaniastova veitir mentanarlig tilboð til allar borgarar, tvs. at allir borgarar hava javnbjóðis rættindi til at gera brúk av hesum tilboðum. Hetta kommunalt fíggjaða virksemið hjá Spaniastovu er ikki skipað við heimild í lóg, men talan er um kommunala stigtøku til at styrkja og menna nøkur tilboð, sum betra um vælferð og trivnað borgaranna.

Hetta hevur tískil ikki nakað beinleiðis lógargrundarlag, men við tað at talan er um tilboð av almennum slag, sum bæði aðrastaðni her í landinum og í grannalondum okkara verða fíggjað av kommunum, og við tað at hesi tilboð verða veitt øllum borgarum, er talan um almannagagnlig tiltøk, ið sostatt ikki eru í stríð við nakra lóggávu, og sum fella innan fyri kommunufulltrúina.

Viðfest er notat frá løgfrøðingi kommununnar, Jóan Hendrik Samuelsen, har staðfest verður, at henda uppraðfesting av Spaniastovu fellur innan fyri kommunufulltrúina. Bárður Larsen, løgfrøðingur, hevur somuleiðis fingið málið til ummælis, og er hann av somu fatan sum kommunali løgfrøðingurin.

*Samanumtikið*
Grundgevingar fyri gerð av avrikssáttmála við Spaniastovu v/Jógvan A. Joensen eru eitt nú:
- Menning av mentanarligu tilboðunum í Spaniastovu og í umhvørvinum annars úti í Klaksvík
- Menning av kommununi innan upplivingarbúskap, sum er eitt av innsatsøkjum býráðsins sambært samtyktu vakstrarætlanini frá 2011
- Møguleikar fyri at skapa eitt fornfrøðigt og mentanarligt umhvørvi úti í Klaksvík, har allir partar arbeiða saman og harvið skapa eitt grundarlag fyri eini synergi, og har søguliga umhvørvið í og kring Klaksvíksgarðin verður latið enn meira upp fyri almenninginum

Viðlagt hesum tilmæli eru hesi fylgiskjøl:
- Uppskot til Avrikssáttmála millum Klaksvíkar kommunu og Spaniastovu
- Løgfrøðiligt notat frá Jóan Hendrik Svabo Samuelsen, løgfrøðingi kommununnar

**Av tí at her er talan um eina eykajáttan í inniverandi fíggjarári (2018), verður hetta tilmæli at samtykkja av tveimum býráðsfundum.**

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi frágreiðing og tilmæli og til viðløgdu undirskjøl, verður – í samráð við politisku leiðsluna – mælt nevndum og býráði til at samtykkja hesa uppraðfesting av mentanarligu tilboðunum í Spaniastovu og í umhvørvinum annars úti í Klaksvík, og at hesar fáa gildi beinanvegin.

*Framhald á næstu síðu...*

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

*...framhald frá síðstu síðu.*

**<u>TrN B&U 13-03-2018</u>**
Ein meiriluti, Beinta Klakstein, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig, tekur undir við tilmælinum dagfest 07.03.2018.
Ein minniluti, Herfrí Sørensen, tekur støðu í býráðnum.
Ein annar minniluti, Beinir Johannesen, mælir til, at støða verður tikin til framtíðarvirksemið í Spaniastovu, tá arbeiðsbólkurin er komin við sínum tilmæli.

**<u>MeN 13-03-2018</u>**
Ein meiriluti, Signhild V. Johannesen, Beinta Klakstein og Óli M. Lassen, tekur undir við meirilutanum í TrN B&U 13-03-2018.
Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Atli S. Justinussen, tekur undir við minnilutanum í TrN B&U (Beinir Johannesen) 13-03-2018 og mælir til, at samskipanin av mentanardeplinum í kommununi fevnir breiðari enn nevnda tilmæli. At arbeiðsbólkurin, ætlanin er at seta, skal greina og samansjóða allar tættir av mentanarlívinum í Klaksvík saman við eini uppraðfesting av Tónlistaskúlanum. Somuleiðis mælir minnilutin til, at søkt verður eftir nýggjum leiðara til Mentanarhúsið í góðari tíð, so hesin fær møguleika at samskipa økið, ið hann fær ábyrgdina av.

**<u>FíN 21-03-2018</u>**
Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig, tekur undir við meirilutunum í B&U og MeN 13-03-2018, vísandi til dagførda uppskotið frá umsitingini (dagf. 20-03-2018), ið varð lagt fyri FíN.
Ein minniluti, Atli S. Justinussen, tekur undir við minnilutanum í MeN 13-03-2018.
Herfrí J. Sørensen tekur støðu í býráðnum.

**<u>Býráðsins samtykt 22-03-2018</u>**
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá FíN 21-03-2018; tað varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Óli M. Lassen og Steinbjørn O. Jacobsen, og 4 atkvøðum ímóti, Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen og Herfrí J. Sørensen.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

**47/18**
**15/00896-14 Uppraðfesting av mentanardeplum í Klaksvík –** ***eykajáttan, seinna viðgerð***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Váttað |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 13.03.2018 | 10/18 | |
| 2 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 13.03.2018 | 6/18 | |
| 3 Fíggjarnevndin | 21.03.2018 | 15/18 | |
| 4 Klaksvíkar Býráð - *fyrra viðgerð* | 22.03.2018 | 28/18 | |
| 5 Klaksvíkar Býráð - *seinna viðgerð* | 03.05.2018 | 47/18 | |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 22. mars 2018.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Sambært lønardeild kommununnar eru tær samlaðu, árligu lønarútreiðslurnar í sambandi við Jógvan Andrias við øllum tilhoyrandi gjøldum: 440.000 kr. ella 36.667 kr. um mánaðin.

Í sambandi við møguliga fráferð úr starvi hevur Jógvan Andrias Joensen higartil uppspart sær eina uppsagnartíð á fimm mánaðir, umframt uppsparda feriu.

Avtalað er við Jógvan Andrias, at hann fær løn í tveir mánaðir. Í sambandi við hesa ætlaðu fráferð úr kommunala starvinum, sum fær gildi pr. 1. apríl 2018. Sostatt verður talan um løn í tveir mánaðir (apríl og mai) + umleið 6 vikur í uppspardari summarferiu. Henda útreiðsla verður borin av játtanini til Húsið.

Lagt verður upp til, at árliga gjald kommununnar sambært avrikssáttmálan við Spaniastovu verður 530.000 kr., ella 44.167 kr. um mánaðin forút.

Omanfyrinevnda árliga upphædd er sett saman av hesum upphæddum:

| | |
|---|---|
| Grundupphædd í avrikssáttmálanum | 450.000 kr. |
| Mettar útreiðslur fyri leigu v.m. | 50.000 kr. |
| Mettar útreiðslur fyri tiltøk v.m. (verandi avseting) | 30.000 kr. |
| Samanlagt: | 530.000 kr. |

**Fyrsta gjaldið fellur 1. apríl 2018, so talan verður um tríggjar ársfjórðingar (níggju mánaðir) í hesum fyrsta fíggjarárinum, har samlaðu útreiðslurnar av avrikssáttmálanum fyri 2018 sostatt verða 9 mánaðir x 44.167 kr = 397.500 kr.**

Miðað verður ímóti, at Spaniastova tey eftirfylgjandi árini fær eina árliga játtan á 530.000 kr. Tó verður støddin av árliga gjaldinum at eftirmeta og áseta fyri eftirfylgjandi árið á einum árligum fundi millum partarnar í oktober mánað, fyrstu ferð í oktober 2018. Sí nærri ásetingar hesum viðvíkjandi í viðlagda uppskoti til avrikssáttmála.

*Framhald á næstu síðu...*

**KLAKSVÍKAR KOMMUNA** Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

*...framhald frá síðstu síðu.*

Sum tað framgongur av niðanfyri standandi skermmynd av Weblundanum, so er avsetingin í samtyktu fíggjarætlan býráðsins fyri árið 2018 til rakstrarstað nr. 05241470038 *"Stuðul til mentan"* samanlagt 2.417.000 kr.

| | | |
|---|---|---|
| 05241470038 | Stuðul til mentan | 2.417.000 |
| 111000 | Løn, mánaðarlønt | 80.000 |
| 142000 | Umboðan | 0 |
| 146980 | Keyp av vørum annars | 0 |
| 147905 | Lýsingar Tæn.keyp | 10.000 |
| 154000 | Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 0 |
| 524000 | Tilskot til einstaklingar undir sosialum skipanum | 0 |
| 524500 | Tilskot til einstaklingar - útbúgving, gransking o.a. | 30.000 |
| 542000 | Vanligur rakstrarstuðul til stovnar | 1.805.000 |
| 549000 | Annar stuðul o.a. | 190.000 |
| 549040 | Stuðul til áhugafeløg (ítrótt v.m) | 146.000 |
| 549060 | Stuðul smærri útgj. | 156.000 |
| 751100 | Keyps-mvg | 0 |
| 759800 | Endurrindan av keyps-mvg kommunur | 0 |

Av niðanfyri standandi útgreining hjá Mentanardeildini av hesum sama rakstrarstaði framgongur, at partur av nevndu, samlaðu avseting eru 30.000 kr., sum eru settar av til tiltøk hjá "Leikar í Lund" – sí mynd:

**Stuðul Mentan**

**Stuðul mentan, 0541470038**

| Felag | 2018 | | Løn 111000 | Keyp vørur Konta 146980 | Lýsingar Konta 147905 | v.m. Konta 154000 | sosial skip Konta 524000 | útbúgv/gransk Konta 524500 | stuð > 50% Konta 542000 | stuðul Konta 549000 | áhugafel Konta 549040 | smærri útgj. Konta 549060 | Konta Samanlagt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Kl Sjónleikarafelag | 50.000 | 549040 | | | | | | | | | 50.000 | | 50.000 |
| AA - Húsatuðul | 6.000 | 549040 | | | | | | | | | 6.000 | | 6.000 |
| Kl Hornorkestur | 50.000 | 549040 | | | | | | | | | 50.000 | | 50.000 |
| Miðstovan | 50.000 | 542000 | | | | | | | 50.000 | | | | 50.000 |
| Norð Fornminnisavn | 425.000 | 542000 | | | | | | | 425.000 | | | | 425.000 |
| Atlantis | - | | | | | | | | | | | | - |
| Dragin | 50.000 | 542000 | | | | | | | 50.000 | | | | 50.000 |
| Leikar í Lund | 30.000 | 542000 | | | | | | | 30.000 | | | | 30.000 |
| Gr Mentanarhús | 450.000 | 542000 | | | | | | | 450.000 | | | | 450.000 |
| Keyp Listarverk | - | | | | | | | | | | | | - |
| Aðrir studningar | 156.000 | 549060 | | | | | | | | | | 156.000 | 156.000 |
| Grunnur mentanartiltøk | 200.000 | | | | 10.000 | | | | | 190.000 | | | 200.000 |
| Stuðul Lestrarkort | 30.000 | 524500 | | | | | | 30.000 | | | | | 30.000 |
| Kunningarstovan | 500.000 | 542000 | | | | | | | 500.000 | | | | 500.000 |
| Róðraneyst Árnafj | 40.000 | 549040 | | | | | | | | | 40.000 | | 40.000 |
| Søguskriving | 80.000 | 111000 | 80.000 | | | | | | 0 | | | | 80.000 |
| Grunnur spinnarí | 300.000 | 542000 | | | | | | | 300.000 | | | | 300.000 |
| FMA | - | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | |
| | | | | | | | | | | | | | - |
| *Tilsaman* | *2.417.000* | | 80.000 | 0 | 10.000 | 0 | 0 | 30.000 | 1.805.000 | 190.000 | 146.000 | 156.000 | 2.417.000 |

Mælt verður til, at nevnda upphædd á 30.000 kr. til Leikar í Lund verður partur av fíggingini av hesum avrikssáttmála við Spaniastovu og harvið minkar árliga meirkostnaðin av hesum við 30.000 kr.

**Neyðuga eykajáttanin til hetta tiltak í inniverandi ári (2018) verður sostatt:**

| | |
|---|---|
| Meirkostnaður av avrikssáttmálanum í 2018: (9 mánaðir x 44.167 Kr.) | 397.500 kr. |
| Verandi avseting til "Leikar í Lund" (542000) – partur av 05241470038 | -30.000 kr. |
| **Tvs. tørvandi eykajáttan 2018:** | **367.500 kr.** |

*Framhald á næstu síðu...*

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

*...framhald frá síðstu síðu.*

**Til at fíggja hesa nýggju rakstrarútreiðslu verður mælt til, at býráðið samtykkir nevndu upphædd á 367.500 kr. sum eina eykajáttan í 2018 til til rakstrarstað nr. 05241470038 "Stuðul til mentan".**

*Arbeiðsbólkur gera tilmæli um framtíðar skipan og samskipan av virkseminum út í Klaksvík*

Samstundis sum Spaniastova við hesum verður uppraðfest, er avtalað við Jógvan Andrias og savnsleiðsluna, at arbeiðast skal víðari við at finna tann besta framtíðar bygnaðin fyri Norðoya Fornminnissavn og Spaniastovu v.m.

Tí verður samstundis mælt til, at ein arbeiðsbólkur verður settur at kanna allar møguleikar og fortreytir fyri skipan av tí samlaða virkseminum í bæði Norðoya Fornminnissavni og Spaniastovu sum partur av savninum, og at koma við einum uppskoti um skipan.

Um so verður, at hetta tilmæli verður samtykt, verður mælt til, at Mentanardeildin ger eitt uppfylgjandi tilmæli í samráð við Norðoya Fornminnissavn og Spaniastovu, sum verður at leggja fyri eitt av fyrst komandi fundarumførunum um arbeiðssetning og manning av nevnda arbeiðsbólki.

**Lógargrundarlag:**
Spaniastova veitir mentanarlig tilboð til allar borgarar, tvs. at allir borgarar hava javnbjóðis rættindi til at gera brúk av hesum tilboðum. Hetta kommunalt fíggjaða virksemið hjá Spaniastovu er ikki skipað við heimild í lóg, men talan er um kommunala stigtøku til at styrkja og menna nøkur tilboð, sum betra um vælferð og trivnað borgaranna.

Hetta hevur tískil ikki nakað beinleiðis lógargrundarlag, men við tað at talan er um tilboð av almennum slag, sum bæði aðrastaðni her í landinum og í grannalondum okkara verða fíggjað av kommunum, og við tað at hesi tilboð verða veitt øllum borgarum, er talan um almannagagnlig tiltøk, ið sostatt ikki eru í stríð við nakra lóggávu, og sum fella innan fyri kommunufulltrúina.

Viðfest er notat frá løgfrøðingi kommununnar, Jóan Hendrik Samuelsen, har staðfest verður, at henda uppraðfesting av Spaniastovu fellur innan fyri kommunufulltrúina. Bárður Larsen, løgfrøðingur, hevur somuleiðis fingið málið til ummælis, og er hann av somu fatan sum kommunali løgfrøðingurin.

*Samanumtikið*

Grundgevingar fyri gerð av avrikssáttmála við Spaniastovu v/Jógvan A. Joensen eru eitt nú:

- Menning av mentanarligu tilboðunum í Spaniastovu og í umhvørvinum annars úti í Klaksvík
- Menning av kommununi innan upplivingarbúskap, sum er eitt av innsatsøkjum býráðsins sambært samtyktu vakstraræatlanini frá 2011
- Møguleikar fyri at skapa eitt fornfrøðigt og mentanarligt umhvørvi úti í Klaksvík, har allir partar arbeiða saman og harvið skapa eitt grundarlag fyri eini synergi, og har søguliga umhvørvið í og kring Klaksvíksgarðin verður latið enn meira upp fyri almenninginum

*Framhald á næstu síðu...*

*...framhald frá síðstu síðu.*

Viðlagt hesum tilmæli eru hesi fylgiskjøl:

- Uppskot til Avrikssáttmála millum Klaksvíkar kommunu og Spaniastovu
- Løgfrøðiligt notat frá Jóan Hendrik Svabo Samuelsen, løgfrøðingi kommununnar

**Av tí at her er talan um eina eykajáttan í inniverandi fíggjarári (2018), verður hetta tilmæli at samtykkja av tveimum býráðsfundum.**

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi frágreiðing og tilmæli og til viðløgdu undirskjøl, verður – í samráð við politisku leiðsluna – mælt nevndum og býráði til at samtykkja hesa uppraðfesting av mentanarligu tilboðunum í Spaniastovu og í umhvørvinum annars úti í Klaksvík, og at hesar fáa gildi beinanvegin.

**MeN 13-03-2018**
Ein meiriluti, Signhild V. Johannesen, Beinta Klakstein og Óli M. Lassen taka undir við meirilutanum í TrN B&U 13-03-2018.

Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Atli S. Justinussen taka undir við minnilutanum í TrN B&U (Beinir Johannesen) 13-03-2018 og mæla til at samskipanin av mentanardeplinum í kommununi fevnir breiðari enn nevnda tilmæli. At arbeiðsbólkurin, sum ætlanin er at seta, skal greina og samansjóða allar tættir av mentanarlívinum í Klaksvík saman við eini uppraðfesting av Tónlistaskúlanum. Somuleiðis mæla vit til, at søkt verður eftir nýggjum leiðara til Mentananrhúsið í góðari tíð, so hesin fær møguleika at samskipa økið ið hann fær ábyrgdina av.

**13-03-2018 TrN B&U:**
Ein meiriluti, Beinta Klakstein, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig taka undir við tilmælinum dagfest 07.03.2018.
Ein minniluti, Herfrí Sørensen tekur støðu í býráðnum.
Ein annar minniluti, Beinir Johannesen mælir til at støða verður tikin til framtíðarvirksemi í Spaniastovu, tá arbeiðsbólkurin er komin við sínum tilmæli.

**FíN 21-03-2018**
Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig, tekur undir við meirilutunum í B&U og MeN 13-03-2018, vísandi til dagførda uppskotið frá umsitingini (dagf. 20-03-2018), ið varð lagt fyri FíN.
Ein minniluti, Atli S. Justinussen, tekur undir við minnilutanum í MeN 13-03-2018.
Herfrí J. Sørensen tekur støðu í býráðnum.

*Framhald á næstu síðu...*

KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

*...framhald frá síðstu síðu.*

**Býráðsins samtykt 22-03-2018**
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá FíN 21-03-2018; tað varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Óli M. Lassen og Steinbjørn O. Jacobsen, og 4 atkvøðum ímóti, Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen og Herfrí J. Sørensen.

**Býráðsins samtykt 03-05-2018**
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá BýR 22-03-2018; tað varð samtykt við 7 atkvøðum fyri (Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Óli M. Lassen og Steinbjørn O. Jacobsen) og 4 atkvøðum ímóti (Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen og Herfrí J. Sørensen).